# Eysturoyggin við í fremstu røð



FRÍÐGERÐ HEINESEN
*Sambandsflokkurin*

Stórar útbyggingar eru gjørdar í samferðslukervið og størsta íløgan her á leiðini er Norðoyatunnilin. Gongur sum ætlað, verður næsta stóra íløgan Skálafjarðartunnilin, sum fer at knýta Eysturoynna við høvuðsstaðarøkið. Við hesum íløgum fer Eysturoyggin at liggja sera væl fyri, og hetta er ein støða, sum vit skulu brúka og menna. Hóast Skálafjarðartunnilin ikki er byrjaður enn, er longu tíð at fyrireika seg til hesa broyting.

### Vakstrarmøguleikar

Við Norðoyatunlinum og Skálafjarðartunlinum verða góðir møguleikar fyri vøkstri og menning á einum ási, sum gongur úr høvuðsstaðnum inn á Skálafjørðin, um Gøtueiði, yvir um Leirvíksfjørð og norður til Klaksvíkar og Norðoyggjar. At styrkja og menna okkara øki ger landið meiri fjøltáttað, og harvið verður alt samfelagið ríkari.

Eysturoyggin er í støðugum vøkstri og menning. Fólkatalið veksur spakuliga og hugurin at seta búgv er rættiliga stórur. Tað er at gleðast um, at okkara ungdómur sær sær eina framtíð í oynni. Vit hava somuleiðis eitt sterkt vinnulív, bæði innan fiskivinnu, handverk, handil og tænastur.

### Ítróttur og mentan

Ítrótturin í oynni, og serliga fótbólturin, klára seg væl. Komandi ár hava vit ikki færri enn seks fótbóltslið í formuladeildini. Tað sigur ikki so lítið. Arbeitt hevur verið við einum uppskoti um at byggja eina fótbóltshøll í Eysturoynni í samstarvi millum FSF, kommunurnar og landið. Umframt at menna fótbóltin, letur ein tílík høll upp fyri øðrum nýggjum møguleikum. Vónandi dettur fótbóltshøllin ikki niðurfyri, tí at landið ikki vil gjalda sín part í høllini.

Innan mentan hevur serliga tónleikurin gjørt seg galdandi. Tey ungu síggja ikki mørk, men finna saman og stovna bólkar av ymsum slag, sum eru á høgum støði. Talan er um eitt blómandi tónleikalív, sum eigur at fáa góðar umstøður.

### Almennar tænastur

Eysturoyggin hevur gingið á odda at menna almennu tænasturnar í økinum, serliga á eldraøkinum. Saman við landinum hava kommunurnar bygt sambýlir og í felag hava kommunurnar bygt og útbygt Røktar- og Ellisheimið í Eysturoy. Hóast munandi batar á eldraøkinum, er umráðandi at tað verður gjørt við virðing, so at bæði búfólk og starvsfólk trívast og hava tað gott.

NSR-tænastan í Eysturoy er eitt fyridømi fyri alt landið. Tænastan er eitt samstarv millum kommunur og landið. Her fáa foreldur og starvsfólk, sum arbeiða við børnum, hjálp og vegleiðing. Hetta hevur eydnast so mikið væl, og NSR-tænastan eigur at verða útbygd til øll økir í landinum. Men vit eiga eisini at arbeiða víðari, fyri at fáa betri tilboð í Eysturoy til tey, sum hava serligan tørv.

### Vel Sambandsflokkin

Eysturoyingar hava nógv til felags, og vit eru sera lík. Vit hava okkara stoltleika og vilja helst klára okkum sjálvi. Tað er umráðandi, at vit velja politikarar, sum vilja virka fyri, at Eystoyggin framhaldandi er væl fyri og í støðugari menning, til gangs fyri alt okkara land. Sambandsflokkurin virkar fyri, at vit verða við í fremstu røð

**Farið á val 19. januar og setið X við Sambandsflokkin. Gott val!**

# Økini ið hava mín serliga áhuga



SUNNEVA MOHR, LAMBA
*Javnaðarflokkurin*

### Høvuðsorsøkirnar til at eg havi valt at stilla upp til løgtingsvalið 2008:

- Eg vil vera við til at fáa javnstøðu á tingi. Eri sannførd um, at eitt breiðari kynsbýti og eitt breiðari aldursbýti hevði gagnað føroyskum politikki.
- Meti, at eg kann ávirka samfelagsgongdina tann rættan vegin við mínum hugsjónum.

### Barnsburðarfarloyvi

Málið skal vera eitt ára farloyvi. Fyrsta tíðin er sera umráðandi fyri barnsins menning, tí er tað av stórum týdningi, at barsilsskipanin verður tillagað soleiðis, at foreldrini hava møguleika at verða so nógv um barnið sum tilber.

### Børn við serligum tørvi

Hóast tilboðini til børn við serligum tørvi tey seinnu árini eru betri og fleiri, er tað tó langt eftir á mál. Eg vil virka fyri at bøta um hesi viðurskiftir soleiðis:

- Fleiri tilboð til tað einstaka barnið.
- Tillaga skúlan soleiðis, at hann eisini rúmar barninum við serligum tørvi.
- Menna starvsfólkið
- Umlættingartilboð til barnið og familjuna

### Stakir uppihaldarar

Eg vil berjast fyri at tryggja støkum uppihaldarum og børnum teirra livilig kor. Umstøðurnar eru munandi betri í grannalondunum, tí er tað av stórum týdningi, at vit bøta um hesi viðurskifti soleiðis, at tey ungu heldur velja at verða búgvandi í Føroyum. Hetta gera vit við at :

- Veita dupultan lestrarstuðul
- Veita barnaískoyti
- Gera tað lættari at leiga bústað ella at seta føtur undir egið borð.

**Gott val**

# Hví enda hugsanir Miðfloksins altíð í focus?

**Til hvørt val, og javnan harímillum, verða Miðflokkurin, politikkur hansara og ikki minst leiðarar floksins viðgjørdir úr enda í annan. Í fjølmiðlunum, manna millum, ja enntá í útlondum**



JENIS AV RANA
*Formaður Miðfloksins*

### Løgið, ella?

Nei, í grundini er einki løgið í hesum. Miðflokkurin er jú einasti, ið torir siga fólki sína hugsan um øll grundleggjandi samfelagslig viðurskifti. Viðurskifti, sum vanlig fólk kjakast og tosa um, men sum gomlu føroysku flokkarnir ræðast. Ræðast at siga sína hugsan um, ræðast at kjakast og atkvøða um- og renna undan. Ikki tí, teir hava sínar hugsanir um hesi viðurskifti, men av ótta fyri atkvøðum vilja teir helst ikki avdúka hesar.

### Miðflokkurin hevur greiða støðu til grundleggjandi spurningar!

Fyri Miðflokkin er eingin ivi, hevur tú ikki greiða støðu til tilverunnar mest grundleggjandi spurningar, og torir tú ikki kjakast um og viðurkennast hesar hugsanir, so var betri at tú fanst tær okkurt annað at takast við enn politikk. Tú má vera ærligur og opin yvirfyri tí veljara, tú biður geva tær sína atkvøðu. Opin um mentannarspurningar, um eymar etiskar spurningar, um list og um fosturtøku. Svara spurningum um skrásett parlag, rætt ella ikki hjá homosexuellum at ættleiða og aðrar eldfimar spurningar. Jú tað kostar, men einki, ið hevur virði á fold, er kostnaðarleyst. Bert virðisleysar lættisoppaloysnir eru ókeypis. Men tær varða ikki, tær hvørva eins skjótt og sápublóðran.

Tigur tú um tað grundleggjandi, so fært tú frið fyri naskum spurningum, tí fólk vita, at har er einki at koma eftir. Men tey í Miðflokkinum, tey tora at viðgera lívsins grundleggjandi viðurskifti, so har ber til at tosa við, og kanska loypa á. Men tað taka vit ímóti við gleði. Tí sjálvt um tað er ómakaleysari at tosa um tað, sum hinir raðfesta fremst, t.d. áralanga kjakið um vegurin frá tunnli til tunnil skal liggja undir, omanfyri, niðanfyri ella mitt ígjøgnum Leirvík ( bert fyri at taka eitt dømi um tað, teir gomlu kalla veruligan politikki), so gevur prátið um grundvirðini fleirfalt nøgdsemi, tá dagurin hallar.

### Áhugaverdar val- og stevnuskráir á www.miðflokkurin.fo

Til løgtingsvalið 19. januar eru 18 valevni á lista Miðfloksins og vit hava gjørt eina valskrá, sum tú, saman við stevnuskránni, kanst lesa á heimasíðu okkara, www. miðflokkurin.fo.

Har kanst tú lesa um, hvussu Miðflokkurin ynskir at loysa flest øll samfelagslig viðurskifti, eisini tey omanfyrinevndu grundleggjandi, tey sum teir gomlu flokkanir renna undan. Gev tær tíð at lesa hugsanir okkara, og ring endiliga til onkran okkara, um tú hevur spurningar ella viðmerkingar.

Har lesur tú m.a., at vit meta nógvan pening verða at vinna við at bøta um altjóða skipaskránna FAS, hugsan okra um mótaorðið alheimsgerð, um broytingar av ALS skipanini og um brúkaratrygd. Tú lesur um ætlanir okkara um víðkan av barnsburðarfarloyvinum til eitt ár, um loysn fyri tey langtíðarsjúkrameldaðu, um økispsykiatriina, sum má fáast at virka og um hvussu vit meta fólkaskúlin eigur at mennast. Eisini lesur tú um viðgerðartrygd í heilsuverkinum, og um at seta sjúklinga-umboð og serlækna í eldrasjúkum. Lestrarstuðulin ætla vit skal galda frá 16. ári og verða fyri øll, og vit hava góðar ætlanir um mentanar- og frítíðarøkið. MVG lóggávan tyngir órættvíst og má tí broytast, kringvarps- og sjúkrakassagjøld mega inn í skattin, tí tey raka sosialt skeivt, og alment sett starvsfólk mugu virðast nógv meira enn í dag, her hugsa vit m.a. um eftirútbúgving og løn .

Vóni, at sum tú lesur, gerst tú sannførdari um at velja ein okkara at umboða teg á Løgtingi.

**p.s.:** royn og fá onkran við tær at velja Miðflokkin, tá verður møguleiki okkara størri at fáa ávirkan.

# Útjaðarin grætur eftir læknum og tannlæknum



RODMUNDUR NIELSEN
*Valevni Fólkafloksins*

Skipan skal gerast soleiðis, at tað er áhugavert at koma aftur til Føroyar at virka sum lækni ella tannlækni. Lønin eigur ikki at vera orsøkin, til at læknar velja starvsleið í útlandinum. Tað er neyðugt at gera skipanir sum veruliga draga fólk heimaftur eftir lokna útbúgving.

Spurningurin er eisini um setunnarmyndugleikin av læknum ikki skal flytast frá landsins myndugleikum og yvir til kommunurnar. Ella at kommunurnar koma meira við í hetta arbeiðði, tí tað eru kommunurnar, sum gera karmarnar fyri virkseminum hjá læknunum.

Kommunurnar eiga at hava beinleiðis ávirkan á starvsetan og at lønar karmurin eigur at kunna vaksa fyri at eggja nýggjum læknum at søkja kommunulæknastørvini sum eru leys kring landi. Kommunurnar merkja henda trupuleika hvønn einasta dag, og í dag tykist tað ikki sum vend kemur í skeivu gongdina.

Tá ið vit tosa um tannlæknar eiga vit at gera eina skipan har fleiri føroyingar fáa møguleikan at taka útbúgvingina. Føroyingar áttu at fingið eina ávísa kvotu árliga, á sama hátt vit hava havt á Danmarks Journalistháskúla. Tað er sera trongt á tannlæknaskúlanum og ringt at fáa nýútbúnar tannlæknar heimaftur.

**Vinarliga Rodmundur Nielsen, valevni Fólkaflokksins á Lista A, sjálvandi!**